# Mason hjálpti føroyingum undir krígnum

**Tann 18. januar andaðist Sir Frederick Mason, 94 ára gamal. Hann var ein lyklapersónur sum bretskur konsul tey fyrstu trý árini av bretsku hersetingini av Føroyum í 1940. Óli Jacobsen lýsir her mannin, sum var dyggur stuðul hjá føroyingum undir krígnum**



*Frederic Mason*

## Sir Mason



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Sir Frederick Mason var diplomatur alt lívið. Vit kenna nú mest Frederick Mason frá hansara virksemi í Føroyum. Men tað var sjálvsagt bert ein lítlan part av lívinum, hann var her.

Hann hevur verið blaðungur, tá ið hann byrjaði sítt virksemi á hesum økinum. Hann fekk so eisini ta hægstu viðurkenning, sum kundi fáast fyri hetta virksemi. Her skal verða greitt nakað frá hansara lívsleið.

### Abbin hjálpti við lesnaðinum

Mason var føddur í 1913 í West Ham, har pápi hansara var fólkaskúlalærari, og mamman var dóttir ein keypmann. Frederick var evnagóður í skúlanum, og abbi hansara hjálpti honum at gjalda skúlapeningin, tá ið hann fór á skúla í London. Her fekk hann játtað eitt stipendinum at fara inn á europeiska meginlandið at læra franskt og týskt.

Eitt ár seinni fekk hann aftur stuðul til at fara at lesa á St Catharine's College í Cambridge, og her hjálpti abbin framvegis. Úrslitið var eitt prógv í nútímans máli við toppkarakteri.

Hetta eggjaði honum at fara undir próvtøku í konsulatvirksemi, og hann koma at starvast fleri staðir í Europa, USA og Suðuramerika.

Fyrsta uppgávan var í Belgia. Í 1935 var ein hampiliga stór samfelag av bretskum forrætningsfólki í Antverpen í Belgia. Mason umboðaði her bretskar sjóvinnumyndugleikar í Belgia. Hann virkaði eisini fyri vælferðina hjá bretskum sjófólki. Eisini var hann varakonsul, bert 21 ára gamal.

Síðan var hann sendur til Paris, og aftaná tað til Belgiskt Congo. Í Leopoldville, nú Kinshasa, vóru tveir stovnar, sum tóku sær av sosiala lívinum hjá europearum. Annar av teimumum var bretski golfklubbuirn. Við at gerast heiðurskrivari hjá klubbanum kom Mason at kenna tey flestu fólk av týdningi á hesum leiðum.

Í 1939 varð hann fluttur til Elizabethville í Katanga í Congo at gerast konsul. Hetta var ein spennandi tíð við nógvum týskarum, sum komu inn í Congo úr Norður Rhodesia.

Í 1940-43 var hann í Føroyum og verður greitt serskilt frá hesum.



*Mason kom við Suffolk 13. apríl 1940*

### Bardi uppreistur niður

Í 1943 varð Mason sendur to Colón í Panama sum konsul. Her var eisini nóg mikið at gera. Her búðu 20.000 bretskir vestindarar við nógvum trupulleikum.

Á einum sinni mátti hann berja niður eitt múttarí á einum canadiskum fraktskipi við at fáa sett ta uppreistrarsinnaðu manningina í geglið.

Vegna bardagatíðina var meginparturin av almenna virkseminum hjá bretum uttanfyri Europa samskipað í eina eind. Sum eitt úrslit av hesum gjørdist Mason ein partur av "Foreign Service" og virkaði sum 1. skrivari á bretsku sendistovunum fyrst í Santiago, síðan í Oslo.

Í 1953, eftir at hann eina tíð hevði arbeitt í uttanríkisráðnum, varð hann sendur til Bonn, Athen and Teheran. Aftaná tað skrivaði hann búskaparligar lýsingar av Vesturtýsklandi (1955), Grikkalandi (1956) og av Iran (1957). Hesar lýsingar vóru sera virðismiklar fyri tey, sum vildu gera forrætningar og íløgur í hesum londum.

Mason arbeiddi í Teheran sum fíggjarligur ráðgevi from 1957-60 í eini tíð, tá ið Iran menti seg nógv.

Í 1960 kom Mason aftur til uttanríkisráðið í fýra ár sum leiðari av deildini fyri fíggjarligt samband við onnur lond. Hetta var ein nýskapan innan bretska uttanríkisráðið.

### Heiðraður sum Sir

Chile er eitt land, sum Bretland altíð hevur havt gott samband við. Tey fýra væleydnaðu árini hjá Mason sum sendimaður endaðaðu við eini minniligari og væleydnaðari statsvitjan hjá drotningini Elisabeth og Philip prinsi í 1970.

Mason varð heiðraður við Sir heitið í 1968, eins og hann fekk hægsta ordan frá chilensku stjórnini.

Hansara seinasti postur sum sendiharri var, tá ið hann árini 1971-73 var fasti sendimaðurin hjá Bretlandi hjá ST og øðrum millumtjóða felagsskapum í Geneve.

Eftir at hann hevði lagt frá sær, var Mason sera íðin limur í Altjóða Narkotaeftirlitisnevndini í Geneve, eins og hann hevði onnur álitisstørv.

Hann og kona hansara flutti til Ropley í Hampshire, har hann gjørdist virkin í lokalu søguskrivingini.

Eftir liva kona hansara Karen, tveir synir og ein dóttir.

### Nýtt flagg til føroyingar

Tað er sjálvsagt nógv, ið kundi verið skrivað um tíðina hjá Mason í Føroyum.

Her skal so bert verða nevnt okkurt høvuðsmál, og keldan er Niels Juel Arge.

Tað var tann 12. apríl 1940, at millum onnur skip krússarin Suffolk kom á Havnina sum lið í hersetingini av Føroyum.

Stutt eftir, at skipini komu á Havnina, fór sjefurin fyri enska hermannaliðnum Sandall oberstur saman við útsendinginum frá enska uttanríkisráðnum, Frederick Cecil Mason, niðan til amtmannin. Hann var av ensku stjórnini settur at vera konsul í Føroyum, so leingi bretsku hermenninir vóru her á landi. Hann kom tískil at vera konsul saman við Valdemar Lützen, sum hevði verið konsul frammanundan. Her skal verða skoytt uppí, at sum varakonslar vóru útnevndir Mogens Lützen, sonur Valdemar, og Robert Brockie, breti sum búði í Føroyum.

Mason boðaði frá, at teir vildu leggja seg eftir, at hersetingin ikki skuldi hava so stóra ávirkan á landsins dagliga lív og stýri, og hann vónaði eitt gott samstarv við Føroya Løgting.

Her var nóg mikið at taka sær av. Eitt mál var umlegging av búskapinum, so hann var meira í samsvar við tann bretska. Her var jú eisini talan um peningaviðurskifti.

Eitt tað fyrsta mál, sum Mason rendi seg í var flaggspurningurin á føroyskum skipum. Tey sigldu jú framvegis undir Dannebrog, sum nú veruliga var eitt fíggindaflagg.

Hetta helt bretska flotaleiðslan als ikki kundi bera til. Men amtmaðurin saman við bretsku politisku skipanini hildu fast við Dannebrog.

Mason gav í fyrsta umfari boð